**10 TING UM** LENA MEYER-LANDRUT

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



# Frá studenti til poppstjørnu

19 ÁRA GAMLA **LENA MEYER-LANDRUT** HEVUR EFTIR ONGARI TÍÐ VUNNIÐ FRAM SUM **POPPSTJØRNA**. LEYGARKVØLDIÐ VANN HON EUROPEISKA TÓNLEIKA **GRAND PRIXIÐ**.

1 19 ára gamla Lena varð fødd í Hanover í Týsklandi

2 Sum barn og ung gekk hon til dans, men hon hevur ikki fingið nakra sangfrálæru

3 **Lena tók lut í kappingini Unser Star fur Oslo á sjónvarpsstøðini ARD. Hon vann kappingina og slapp við til europeiska Grand Prixið sum umboð fyri Týskland.**

4 Lena sang tríggjar sangir í týsku kappingini, og hon setti met, tá ið allir sangirnir eitt skifti vóru á topp 5 á hitlistanum í Týsklandi.

5 Vinnandi sangurin frá Grand Prixnum kom beinleiðis inn sum nummar 1 á týska hitlistanum.

6 Nú hevur Lena givið sína fyrstu fløgu út – hon kallast My Cassette Player, og fløgan er ovast á týska hitlistanum.

7 - Mær dámar at bjóða mær sjalvum av, sigur Lena um orsøkina til, at hon sum púra óroyndur sangari bjóðaði seg fram til Grand Prixið.

8 Lena var í holt við sínar studentaprótøku, nú hon alt í einum gjørdist poppstjørna.

9 **Lena hevði stóra pallræðslu, tá ið hon byrjaði sítt Grand Prix ævintýr, men hon hevur ment seg nógv síðani.**

10 Lena er bert annar týski sangarin, sum vinnur Grand Prixið. Tann fyrsti var Nicole við sanginum Ein bisschen Frieden frá 1982.

## SITAT



Summi fólk skapa lukku allastaðni, har tey fara – onnur, tá tey fara

*Oscar Wilde, írskur rithøvundur*

## MIÐLARNIR OG EG



## DURITA NOLSØE

LÝSINGARRÁÐGEVIN Á KVINNU HELDUR, AT LIZA MARKLUND ER FOR FJASUT OG IRRITERAR SEG INNÁ GOMUL TÍÐINDI Í MIÐLUNUM.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Eg blaðið leysligani ígjøgnum tey ókeypis bløðini, ið koma í postkassan. Men annars lesi eg dagbløðini á alnótini.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Um tað eru tíðindi so er tað portal.fo, jp.dk. Um tað skal vera meira »slatur« so er tað bt.dk og eb.dk. Eri eisini inni á kvinna.fo og plagg.fo hvønn dag. Og á ternuryggur.fo – hvønn dag – har gongur dóttir mín á stovni, og har verður førd dagbók hvønn dag.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Mær dámar øll sløg av tónleiki - tað gevur mær gleði. Mær dámar so væl Lenu, og ein onnur, sum altíð endar aftur í fløguspælarinum, er Eve Cassedy. Men annars so er tað »Hjørdis og genturnar« sum verða mest spældar í løtuni – dóttir mín elskar tí fløguna.




**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Facebook. Eg eri inni á facebook hvønn dag og tað er meiri enn so, at tað verður brúkt til arbeiðsbrúk ! Fái nógv góð hugskot har inni - og síggi eina rúgvu av vøkrum kvinnun – sum ger mær lívið lættari til arbeiðis.

**MÍN DVD**
Havi sera ilt við at klára at sita frammanfyri sjónvarpi í tveir samanhangandi tímar... Havi »Slumdog millionaire«, sum liggur og bíðar eftir at verða sæddur í dvd´in. MEN Love Actually! Tá kobli eg totalt av og njóti lekkur fólk, lekkur klæði, lekkran tónleik og lekkurt...




**MÍTT MAGASIN**
Sjálvandi Kvinna – og so er tað eisini Eurowoman, IN, Woman og Cosmopolitan, sum vera hugd í hvørjaferð tey koma út

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Sex and the city er barasta for well! Tær eru herligar! KLOVN er heldur ikki at forsmáa.

**MÍN BÓK**
Beint nú er tað einans Organisatión - sum eg skal til prótøku í í summar. Av føgrum bókmentum dámar mær allarbest at lesa krimi – tó eri eg eitt sindur kræsin. Eg kann ikki torga, tá tað verður ov fjasut/simpult – so sum Lisa Marklund. Stieg Larsson var harafturímóti fínur. Annars so dámdi mær sera væl triologina hjá Hanne Vibeke Holst – Krónprinsessan, Kongamorðið og Dronningeofret. Eg elski at lesa!

**MÍTT ÚTVARP**
Har tónleikurin er best

**MÍN TELEFON**
Sony Ericsson walkman W980

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Gomul tíðindi

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Gomul tíðindi

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Nýggjum tíðindum ;)

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos